## Wozniacki skal møta Hingis



16 ára gamla danska tennisstjørnan, Caroline Wozniacki, hevur fingið fram úr góð úrslit í ár, og hon er farin nærum 100 pláss upp eftir heimsstyrkilistanum síðstu tíðina. Í síðstu viku vann Wozniacki eina kapping í USA, sum førdi hann enn longur upp eftir styrkilistanum. Í hesum døgum er hon aftur við í eini kapping í USA, har hon hevur spælt seg víðari til aðru rundu. Her skal hon møta einari av sínum stóru fyrimyndum, nevniliga sveisisku, Martina Hingis. Hingis liggur í løtuni á sætta plássi á heimsstyrkilistanum, so hetta verður ein stórur biti hjá 16 ára gomlu Wozniacki.

## Hálvfinalurnar vera leygardagin

Í gjárkvøldið var síðsta umfar í Sunset-kappingini hjá kvinnum á skránni, men undan dystunum var longu avgjørt, hvørji lið vóru klár til hálvfinalurnar. Leygardagin skulu liðini so út í fyrsta hálvfinalurnar, og her tekur StÍF ímóti Stjørnuni í høllini á Skála kl. 15.00, meðan Neistin og VB bresta saman í høllini á Hálsi kl. 14.30. Seinnu hálvfinalurnar vera vikuskiftið 17. og 18. mars.

StÍF-Neistin 23-23 (12-12)

# StÍF og Neistin býttu stigini

**Liðini skiftust um at føra, tá STÍF tók ímóti Neistanum í síðsta umfari av Sunset-kappingini, men at enda samdust liðini um at býta stigini sínámillum**



*StÍF og Neistin býttu stigini í seinasta umfarinum í Sunset-kappingini*

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Bæði StÍF og Neistin vóru tryggjaði víðari luttøku til hálvfinalurnar í Sunset-kappingini undan innanhýsis dystin í gjárkvøldið. Liðini høvdu sostatt ikki tað heilt stóra at spæla um, men dysturin bleiv bæði javnur og spennandi.

### StÍF var oman á

Fyrstu løtuna gekk janvt á ímillum liðini. Tey skiftust um at skora, men eftir 10 minuttir tók StÍF eitt ordans hál. Tær løgdu seg á odda við trimum málum, og hesa løtuna spældu strandakvinnur sera væl.

Neistin vísti tó, at tær vóru ikki komnar inn á Skála bert til at tapa dystin. Tær otaðu seg róliga inn aftur á StÍF, og tá fimm minuttir restaðu av fyrra hálvleiki stóð aftur á jøvnum millum liðini.

Síðstu løtuna av hálvleikinum kom rættilig fer á liðini, og tey skoraðu í mest sum hvørjum álopi. Tey skiftust tó um at skora, so tá liðini fóru til hálvleiks, stóð á jøvnum 12-12.

### Neistin var tætt við sigurin

Í seinna hálvleiki var vent í holuni. Nú vóru tað nevniliga gestirnir úr Havnini, sum fingu eina væl betri byrjan enn heimaliðið. Neistin legði seg á odda við tveimum málum mest sum alt fyri eitt, og hesa leiðslu øktu tær um út á dystin.

Tá eitt korter var farið hevði Neistin lagt seg á odda við fýra málum, og nú var líkt til, at bláu favorittarnir ætlaðu at fara frá StÍF. Neistin spældi nevniliga væl hesa løtuna, og StÍF tóktist hava ávísar trupulleikar at spæla seg ígjøgnum verjuna hjá Neistanum.

So við og við kom tó meir gongd á strandakvinnur, og tá átta minuttir restaðu av dystinum var aftur bert eitt mál á muni millum ein spennandi endaspurt.

Seint í dystinum megnaði Neistin aftur at vinna seg fram um við tveimum málum, men StÍF ætlaði sær í minsta lagi eina stigið henda dagin. Tær megnaðu eisini at skjóta síðstu tvey málini, og so endaði dysturin við javnleiki.

Javnleikurin hevði tó ikki tað heilt stóra at týða, tí bæði liðini vóru klár til hálvfinalurnar undan dystinum. Her tekur StÍF ímóti Stjørnuni í fyrru hálvfinaluni leygardagin, meðan Neistin fær vitjan av VB.

### FAKTA

**StÍF-Neistin 23-23 (12-12)**
**Málskjúttar:**
**StÍF:** Rebekka Justinussen 9 (4), Ninna K. Johansen 6, Fríðrun Danielsen 2, Bára Bertelsen 2, Sólfríð Christiansen 2, Rósa Johansen 2
**Neistin:** Nicoleta R. Hansen 7, Katja Eigemann 4 (2), Tordis Tróndarson 3, Maria Dahl 3, Rakul Augustinussen 2 (1), Gunnvá Brockie 2, Heidi Maria Akselsen 1
**Brotskøst:** StÍF 4, Neistin 3

Kyndil-Stjørnan 23-33 (11-12)

# Stjørnan vann síðsta dystin

**Kyndil spældi sín seinasta dyst í Sunset kappingini í gjár, tá tær tóku ímóti Stjørnuni. Kyndil var væl við í fyrra hálvleiki, men í seinna hálvleiki avgjørdi Stjørnan dystin**



*Kyndil var væl við í fyrra hálvleiki, men í seinna hálvleiki setti oddaliðið úr Stjørnuni alt uppá pláss*

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Seinasta umfarið í Sunset kappingini var á skránni sunnudagin, og her skuldi Kyndil út í sín seinasta dyst í Sunset kappingini í ár. Tær liggja nevniliga niðast, og tí skulu tær eftir henda dystin spæla eina upp- & niðurflytingarkapping ímóti liðum úr næstbestu deildini.

Mótstøðuliðið í hesum dystinum var oddaliðið, Stjørnan, og Kyndil fekk sostatt ein seinasta møguleika at vísa, at tær kunnu spæla upp ímóti teimum bestu.

### Kyndil væl við undan steðginum

Oddaliðið úr Stjørnuni fekk betru byrjanina uppá dystin. Sjálvt um tær spardu fleiri av sterkastu spælarunum, so tóktist hetta tó ikki nerva innsatsin á nakran hátt. Eftir 10 minuttum hevði Stjørnan nevniliga lagt seg á odda við trimum málum, og okkurt bendi á, at tær kundu fara frá Kyndli.

Kyndil vildi tó als ikki geva skarvin yvir í teirra seinasta dysti. Tær blivu við at kempa, og eina løtu seinni vóru tær komnar uppá javnleik 6-6. Næstu løtuna fylgdust liðini, men tað var tó alla tíðina Stjørnan, sum var oman á. Tær høvdu til tíðir hug at fara frá Kyndli, men grøna liðið úr Havnini bleiv við at hanga í, so tá liðini fóru til hálvleiks, førdi Stjørnan bert við einum máli.

### Stjørnan avgjørdi dystin

Kyndil hevði kempa væl fyri at fylgt við oddaliðnum í fyrra hálvleiki, og um hetta hevði kostað teimum ov nógvar kreftir, er ilt at meta um. Í seinna hálvleiki megnaði botnliðið nevniliga slett ikki at fylgja við, og leiðslan hjá Stjørnuni vaks frá fyrsta minutti í seinna hálvleiki. Munurin millum liðini bleiv bara størri og størri, og fyrsta korterið av seinna hálvleiki vann Stjørnan heili 11-4, og nú førdu tær brádliga við heili átta málum, og dysturin var avgjørdur.

Eitt skifti førdi Stjørnan eisini við heili 12 málum, men síðstu løtuna av dystinum slapp Kyndil aftur at spæla eitt sindur við. At enda vann Stjørnan við 10 málum, og sostatt fekk Kyndil heldur einki burtur úr teirra síðsta dysti í Sunset kappingini á hesum sinni.

### FAKTA

**Kyndil-Stjørnan 23-33 (11-12)**
**Málskjúttar:**
**Kyndil:** Jacklin Durhuus 7, Anja Heinadóttir 6, Lina Andriulyte 4, Ronja Mikkelsen 4 (2), Súsanna Petersen 2
**Stjørnan:** Simona Petersen 10 (1), Maria við Neyst 7 (1), Bára S. Klakkstein 5, Una Olsen 5, Anna Kristina Samson 3, Louisa Andreassen 2, Durita Mikkelsen 1
**Brotskøst:** Kyndil 2, Stjørnan 3
**Útvísingar:** Kyndil 1, Stjørnan 3
**Dómarar:** Kristian Johansen & Kári Hansen